# Ikki ein roynd at forða útlendskum íløgum

**– Hetta er ein betur íløga enn at seta ognirnar í útlendsk virðisbrøv. Vit hava avgjørt góðar vónir um, at keypið av Tórshavnar Sjómansheimi er ein góð íløga fyri felagið og viðskiftafólkini hjá okkum, sigur Gunnar í Liða, stjóri í Tryggingarfelagnum Føroyar**



*– Vit fingu eitt skriv frá Eyðfinni Jacobsen, adv., sum vegna stýrið fyri Tórshavnar Sjómansheim boðaði frá, at ætlanin var at selja. Í skrivinum spurdi sakførarin, um tryggingarfelagið hevði áhuga fyri at keypa – og tað høvdu vit, sigur Gunnar í Liða, stjóri*

*Mynd: Bárður*

KEYP

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Um 20.30-tíðina seinasta leygarkvøld undirskrivaðu stýrið fyri Tórshavnar Sjómansheim og Tryggingarfelagið Føroyar sáttmála um sølu/keyp av sjómansheiminum. Tað er Eyðfinn Jacobsen, adv., sum vegna stýrið hevur staðið fyri søluni, og undirskrivingin fór fram á skrivstovuni hjá honum.

Gunnar í Liða, stjóri í Tryggingarfelagnum Føroyar, sigur, at felagið fekk eitt skriv frá Eyðfinni Jacobsen, sum vegna stýrið boðaði frá, at ætlanin var at selja sjómansheimið. Í skrivinum spurdi sakførarin, um tryggingarfelagið hevði áhuga fyri at keypa.

### Stórt potentiali

– Jú, tað høvdu vit avgjørt. Tryggingarfelagið hevur frammanundan keypt Hotel Føroyar og Vallarheimið hjá Smyrli Line, og hetta hevur víst seg at vera ein góð íløga.

Stjórin sigur, at leygardagin komu viðurskiftini upp á pláss, og leygarkvøldið varð so sjálv avtalan undirskrivað.

Hann vil ikki siga, hvussu nógv felagið hevur keypt sjómansheimið fyri, men leggur dent á, at hann er væl nøgdur við prísin.

– Vit hava gjørt okkara útrokningar og hava avgjørt góðar vónir um, at keypið av sjómansheiminum eins av Hotel Føroyum og Vallaraheiminum er ein góð íløga. Hetta er ein betur íløga enn at seta ognir tryggingarfelagsins í útlendsk virðisbrøv. Haraftrat kemur, at Tryggingarfelagið Føroyar sum føroyskt felag heldur ynskir at gera íløgur í Føroyum enn uttanlands – og ikki minst í slíkar vinnur, sum vit meta hava eitt potentiali, sum hann tekur til.

Onnur feløg, sum Tryggingarfelagið Føroyar frammanundan eigur partapening í, eru eitt nú Smyrli Line og Havsbrún í Fuglafirði. Felagið hevur eisini veitt Smyrli Line ábyrgdarlán.

### Rakstrarfelag

Gunnar í Liða sigur, at Tryggingarfelagið Føroyar fer ikki at reka Tórshavnar Sjómansheim, men fer at leiga bygningin út til eitt rakstrarfelag, sum síðan rekur hetta virksemi fyri tryggingarfelagið.

– Vit hava 1,4 miljardir krónur, sum skulu plaserast onkustaðni, og tað er okkara uppgáva at syrgja fyri, at hesin peningur gevur eitt so stórt avkast sum gjørligt. Vit keypa sjómansheimið sum eina peningaíløgu, og vit meta eisini, at tað fer at tæna ferðavinnuni í Føroyum, at Tryggingarfelagið nú bæði eigur Hotel Føroyar, Vallaraheimið og Tórshavnar Sjómansheim.

Spurdur, um keypið av føroysku ognunum hevur nakað við óttan fyri útlendskum kapitali í Føroyum at gera, sigur Gunnar í Liða.

– Nei, okkara avgerð um at keypa Hotel Føroyar, Vallaraheimið og nú eisini Tórshavnar Sjómansheim hevur einki við møguligar útlendskar íløgur í Føroyum at gera. Hetta er ikki ein roynd at forða útlendskum íløgum í Føroyum, men eitt keyp, sum vit eru sannførdir um er skilagott fyri okkara felag og viðskiftafólk felagsins, sigur Gunnar í Liða.

**Meira um Sjómansheimið**

Samrøða við Jóhannes Jensen, nýggja stjóran er á bls. 8.

# Tryggingargjøldini eru ikki ov høg

**– Tað er ikki tryggingarvirksemið, sum hevur ríkað felagið seinastu árini, men heldur íløguvirksemið. Jú, størri avkast, tryggingarfelagið hevur – jú bíligari og betri tænastu kunnu vit veita okkara viðskiftafólkum, sigur Gunnar í Liða, stjóri**

TRYGGINGAR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hvussu ber tað til, at Tryggingarfelagið Føroyar hevur orku til at seta so nógvar miljónir í føroysku ferðavinnuna, nú felagið bæði eigur partapening og ábyrgdarlán í Smyril Line, hevur keypt Hotel Føroyar, Vallaraheimið við Oyggjarvegin og nú eisini Tórshavnar Sjómansheim?

Sosialurin spurdi Gunnar í Liða, stjóra í felagnum, um orsøkin er hon, at tryggingartakarar rinda ov høg gjøld fyri sínar tryggingar?

– Ja, hatta er ein góður spurningur, sum nógv ivaleyst seta sær, og tað er gott, at tú setir hann. Men soleiðis hanga viðurskiftini ikki saman.

Stjórin vísir á, at sjálv tryggingarsíðan ikki hevur verið nakað at reypa av seinastu árini.

– Tryggingarinntøkurnar í fjør vóru út við 300 miljónir krónur – og avlopið av hesum virksemi var einar 7-8 miljónir krónur. So, tað er ikki hetta, sum hevur ríkað felagið, men tað íløguvirksemið, sum felagið hevur.

Hinvegin, sigur stjórin, er tað týdningarmikið fyri felagið, at raksturin av tryggingarvirkseminum hongur saman.

### Í tveimum

Gunnar í Liða vísir á, at virksemið hjá Tryggingarfelagnum Føroyar er í tveimum, tryggingarvirksemið og íløgurnar.

Í greinini omanfyri sigur hann, at felagið hevur 1,4 miljardir krónur, sum skulu »plaserast« onkustaðni, og tað er umráðandi, at egin-ognin gevur besta avkastið.

– Tað er sjálvandi týdningarmikið fyri okkum, at raksturin av sjálvum tryggingarvirkseminum eisini hongur saman.

Stjórin sigur, at íløgurnar hjá felagnum skulu síggjast sum eitt supplement til tryggingargjøldini.

– Jú, betri avkast felagið hevur, jú lægri tryggingargjøld og betri tænastu kunnu vit bjóða okkara viðskiftafólkum, sigur hann.

### Broytingar

Stjórin í Tryggingarfelagnum Føroyar sigur, at ymiskar broytingar verða framdar á Tórshavnar Sjómansheimi, sum tíðin gongur, men ætlanin er at fremja hesar í smáum.

Spurdur, væntar hann, at skeinkiloyvi verður útvegað til virksemið.

– Ætlanin er at reka virksemið soleiðis, at vit varðveita tey viðskiftafólk, sum Tórshavnar Sjómansheim hevur í dag. Vit fara at sýna teirri søgu, sum sjómansheimið hevur, virðing – og broytingarnar fara at koma so við og við, sigur Gunnar í Liða.